## Tórshavnar Kommunuskúli

Tórsgøta 25 · 100 Tórshavn · Tlf. 30 25 80
Fax. 30 25 81 · www.skulin.fo/KOM · kom@skulin.fo

# Lærarastørv

### Hesi størv verða lýst leys at søkja frá 1. august 2008

1 lærari í fast starv
3 lærarar í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2008/09 fyri lærarar í farloyvi
2 lærarar í tíðaravmarkað størv skúlaárið 2008/09 fyri lærarar í barnsburðarfarloyvi
1 lærara í tíðaravmarkað starv skúlaárið 2008/09 vegna lækkað tímatal og serligan tørv.

**Søkt verður eftir lærarum, sum**

- duga at samstarva, eru virkisfúsir og fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ábyrgdir og avbjóðingar, sum starvið og tíðin krevur
- leggja dent á stundvísi, nærlagni, fakliga og námsfrøðiliga menning

**Førleikakrøv**

Tey, ið sett verða, skulu hava læraraútbúgving. Læraralesandi, sum taka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

Skúlanum tørvar lærarar, ið kunnu undirvísa í innskúlingini burturav, og annars miðdeildini og framhaldsdeildini í hesum lærugreinum:

Føroyskum, støddfrøði, alisfrøði, evnafrøði, tøkni, ítrótti, sangi/tónleiki, søgu og kristni.

**Lønar- og setanartreytir**

Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so er, at tey, sum sett verða, eru tænastumannasett frammanundan. Størvini eru lønt í lønarflokkunum 18.1 – 29.2 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag. Tímatalið til eitt av tíðaravmarkaðu lærarastørvunum verður ikki endaliga ásett fyrr enn 1. sep. 2008.

**Umsóknir**

Umsóknir við CV og avriti av prógvum og møguligum ummælum skulu vera skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi 23. juni 2008 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlastjórans, tlf. 30 25 80 ella 21 19 47.

**Kommunuskúlin** hevur komandi skúlaár 507 næmingar, 2 flokkar í hvørjum árgangi frá 1. til 7. flokki, 4 flokkar í 8., 5 flokkar í 9. og 3 flokkar í 10. árgangi. Í skúlanum starva 51 lærarar, 1 skrivstovufólk, 2 skúlavørðir og 15 reingerðingsfólk. Vit leggja m.a. dent á at menna KT í undirvísingini, at allir næmingar fáa sínar fakligu avbjóðingar í fjølbroyttari og mennandi frálæru í styrktum samstarvi millum heim og skúla. Áhugað kunnu lesa meira um skúlan á heimasíðuni.




# Størv í Viðareiðis Skúla

**Søkt verður eftir lærarum og stuðulsfólki til Viðareiðis skúla skúlaárið 2008/09.**

**Hesi størv verða lýst leys at seta frá 1. august 2008:**

- 1 lærara í fast starv fulla tíð
- 1 lærara í tíðaravmarkað starv fulla tíð
- 1 lærara til umleið 14 tímar um vikuna (vegna avlopstímar, lækkað tímatal og serligan tørv. Endaliga tímatalið verður ásett eftir 1. sep.)
- einum stuðli við pedagogiskari ábyrgd 20 tímar um vikuna. Uppgávan er at virka sum stuðul hjá næmingum við serligum tørvi.

**Tey, ið sett verða skulu:**

- undir ábyrgd leiðslunnar taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva
- verða fús at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- vera við til áhaldandi at menna skúlan

Skúlanum tørvar lærarar, ið m.a. kunnu átaka sær at undirvísa í:

- føroyskum, donskum og enskum
- støddfrøði, náttúru/tøkni og lívfrøði
- kristni og søgu
- handaverki og list
- tónleiki og ítrótti
- tímar vegna serligan tørv
- vera flokslærari

**Førleikakrøv**

Læraraútbúgving ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum.

Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum.

**Lønar- og setanartreytir**

Lærarastørvini verða sett sum sáttmálasett størv, uttan so at tey, ið sett verða, eru tænastumannasettir lærarar frammanundan.

Lærarastørvini verða lønt sambært avtalu millum Føroya Lærarafelag og Fíggjarmálastýrið í lønarflokkunum 18.1 – 27.4.

Stuðulsstarvið verður lønt eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálastýrið.

**Umsóknir**

Umsóknir við c.v. og avriti av prógvum skulu vera skúlaleiðaranum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini við at venda sær til skúlaleiðaran, Jensebeth Absalonsen, á tlf. 45 11 80 ella 58 80 52.

**Viðareiðis skúli** hevur komandi skúlaár 50 næmingar og 7 lærarar. Tú kanst lesa meira um okkum á heimasíðuni www.skulin.fo/vid

## TJÓÐPALLUR FØROYA

## Skrivstovustarv

Søkt verður eftir skrivstovufólki til Tjóðpall Føroya. Vit kunnu bjóða eitt arbeiðspláss við sál, har hvørt starvsfólk hevur sín týdningamikla leiklut í uppgávuni at geva áskoðarum spennandi og avbjóðandi upplivingar á høgum listarligum stigi.

**Starvið**
Talan er um hálvtíðarstarv við setan frá 1. september 2008 ella skjótast til ber.

**Starvið fevnir í høvuðsheitinum um**
· telefon og postavgreiðsla
· bókhald
· skrivarauppgávur
· annað fyrifallandi arbeiði

**Førleiki**
Best er við skrivstovuútbúgving og -royndum, størst týdning hevur tað tó, at tú:
· hevur góðan førleika til at arbeiða sjálvstøðugt
· ert stinn/ur í føroyskum
· hevur góð evni at samskifta og samstarva við onnur
· hevur góðan teldukunnleika

**Lønar og setanartreytir**
Starvið verður sett sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Starvsmannafelagið og lønt samsvarandi 3. flokki.

**Meiri fæst at vita**
um starvið við at venda sær til Jenny C. Petersen, stjóra, á tel. 228086 ella á grima@post.olivant.fo

**Umsókn**
Umsóknir við avriti av prógvum, cv og møguligum viðmælum skulu vera Tjóðpallinum í hendi í seinasta lagi mánadagin 23. juni 2008.

**Umsóknir skulu sendast til:**
**Tjóðpall Føroya**
Tórsgøtu 9
Postrúm 212
110 Tórshavn



**REXTON** Einans 280.000


**MAZDA 6** Einans 150.000

**Les meira á bil.fo ella ring 218414**

Lesið Sosialin - so eru tit við